# Kári hitti Jólamannin

**Løgingsmaðurin, Kári P. Højgaard, kennir alt til at ganga runt við pakkum. Tí vakti tað eisini hansara áhuga, tá hann hoyrdi málageipanina í býnum, nú Kjøtkrókur fór stunandi umborð á Norðlýsið.**

Kári er av lyndi ein forvitin maður. Ein spurningur, sum hann ofta hevur hugsað um í fyrrverandi starvinum sum postmaður, er, hvussu jólamenninir leggja alt til rættis, tá teir skulu runt við somikið nógvum pakkum.

Kjøtkrókur hevði sjálvandi skund, nú øðurnar til ommuna skuldu finnast, men Kári var eins kvikur. Hann læt tingfund vera tingfund. slongdi snotuligu bláu skjáttuna um herðarnar, og so helt hann avstað. Og áðrenn Kjøtkrókur var komin til Torgið í Vágsbotni, hevði sjálvstýrarin fingið hann aftur.

Og so var at spyrja um mangt og hvat. Millum annað segði Kári, at hann væl kundi hjálpa Kjøtkróki, nú pakkar skulu berast kring alt landið. Tað, sum Kári tó ikki segði jólamanninum, var, at hann fyrst og fremst vildi vita, hvat var í pakkunum. Sum tað sæst, so eydnaðist tað eisini at kaga í posan, men tá komið var eftir, at hesin ikki innihelt nakra konsessión um undirsjóvartunnil millum Eysturoynna og Tórshavn, kølnaði áhugin tó nakað. Og meðan Kjøtkrókur fekk øður frá Birgiri Enni, fór Kári niðan aftur í tingið.




























